## Upptøkuroynd

**Tónleikaverk**

a) Umsøkjarin framførir eitt lítið stykki, ið hann frammanundan hevur lært seg.

**Tónastigar o.a.**

a) Umsøkjarin verður biðin um at spæla nakrar tónastigar við einari hond ella við báðum hondunum samstundis.

b) Umsøkjari skal eisini fyrireika kadansuspæl á klaver

viðm. Annars verður næmingurin spurdur um hvussu leingi hann hevur leikt klaver og royndin er í mesta mun í samrøðuformi.
Royndin er bert vegleiðandi og skal geva eina meting av, á hvørjum støði næmingurin er á.
Øll á Miðnámi skulu hava klaver sum hjálærugrein.

## 1. árið

**Tónleikaverk**

a) Fyrsta árið lærir næmingurin at spæla klaver á byrjanarstøði. Støði við árslok eigur at vera samsvarandi Associated Board klaverroynd Grade 2.

**Tónastigar o.a.**

a) Tónastigar
Dur-stigar: C, G, D, A, E og F
Reinir og melodiskir moll-stigar: a, e, h og d

Viðm. Tónastigar verða spældir tvær áttundir við hvørjari hond sær og við báðum hondum og uttanat

b) Arpeggio (brotnir tríklangir)
Dur: C, G, D, A, E og F
Moll: a, e, h, og d

Viðm. Verða spæld sum einføld arpeggio frá grundtóna við hvørjari hond sær (tvær áttundir) og uttanat

c) Einfaldar kadensur (spældar uttanat)
í Dur (T-S-D-T): C, G, D, A , E og F
í moll (t-s-D-t): a, e, h, og d

## 1. ársroynd

**Tónleikaverk**

a) Til ársroyndina spælir næmingurin 2 stutt verk við ymsum lyndisløgum

Dømi:
1. L. Mozart: Menuett D-dur (Nannerl-Notenbuch nr. 10)
2. L. Duvernoy:Etuda F-dur, opus 176 nr. 17

**Prima vista - secunda vista**

a) Prima vista: Stutt og einfalt dømi við upp til tveimum formerkjum (støði: sum Associated Board Grade 2)

## 2. árið

### Tónleikaverk

a) Annað árið verður hildið fram, so næmingurin við árslok dugir at spæla stykki á sama støði sum Associated Board klaverroynd Grade 4.

### Tónastigar o.a

a) Tónastigar:
Dur-stigar: A, E, H, B, Ess, Ass og Dess
Reinir, melodiskir og harmoniskir moll-stigar: h, g, c, f, ciss og giss

Viðm. Tónastigar verða spældir tvær áttundir við báðum hondum. Uttanat

b) Arpeggio
Dur: C, G, D, A, E, H, F, B, Ess, Ass og Dess
Moll: a, e, h, d, g og c

Viðm. Einføld arpeggio frá grundtóna við hvørjari hond sær og við báðum hondum (tvær áttundir). Uttanat

c) Einfaldar kadensur. Uttanat
Dur (T-S-D-T): sum dur-stigarnir (A, E, H......)
Moll (t-s-D-t): sum moll-stigarnir (h, g, c......)

## 2. ársroynd

### Tónleikaverk

a) Til ársroyndina spælir næmingurin 2 stutt verk við ymsum lyndisløgum

Dømi:
1. B. Godard: Premier Chagrin úr Et. Enfantines, opus 149 nr. 6
2. E. Grieg: Alfedans úr Lyriske stykker, opus 12 nr. 4

b) Harumframt spælir næmingurin fýraraddaðan koral.

### Prima vista - secunda vista

a) Prima vista: Stutt dømi (sum Associated Board Grade 3)

## 3. árið

**Tónleikaverk**

a) Triðja árið verður hildið fram, so næmingurin við árslok dugir at spæla stykki á sama støði sum Associated Board klaverroynd Grade 5.

**Tónastigar o.a.**

a) Tónastigar
Dur-stigar: Allir
Reinir, melodiskir og harmoniskir moll-stigar: Allir

Viðm. Tónastigar verða spældir tvær áttundir við hvørjari hond sær og við báðum hondum og uttanat

b) Arpeggio
Dur: øll tónasløg
Moll: øll tónasløg

Viðm. Einføld arpeggio frá grundtóna við hvørjari hond sær og við báðum hondum (tvær áttundir), uttanat

c) Einfaldar kadensur
upp til seks fortekn

d) Víðkaðar kadensur
Dur (T-Tp-Sp-D-T-S-T): upp til trý fortekn

## 3. ársroynd

**Tónleikaverk**

a) Til ársroyndina spælir næmingurin 2 verk við ymsum lyndisløgum,

Dømi:
1. J.S. Bach: Inventio nr. 8 F-dur, BWV 780
2. P. Tchaikovsky: Chant de l'alouette, opus 39 nr. 22

b) Harumframt spælir næmingurin fýraraddaðan koral.

**Prima vista - secunda vista**

a) Prima vista: Dømi sum Associated Board Grade 4